## RG sterkari innanhýsis

Royal Greenland hevur fingið nýggjan bygnað, sum sambært leiðsluni skal menna fyritøkuna við øktum samstarvi og meiri gjøgnumskygni fyri eyga. Í hesum sambandi er Lars Nielsen settur at hava ábyrgdina av allari framleiðslu hjá Royal Greenland á landi í Grønlandi og uttan fyri Grønland, og Michael Riis hevur ábyrgdina av øllum flutningi. Flemming Knudsen, aðalstjóri, sigur við KNR, at nýggi bygnaðurin skal eisini økja vinningin hjá Royal Greenland.



*Lars Nielsen stendur fyri allar framleiðslu á landi hjá Royal Greenland (Mynd: Sermitsiaq)*

# Hví samskipa íverksetara

**Sum nú er, eru tvey íverksetarahús í Føroyum. SamVit samstarvar við bæði verandi íverksetarahúsini og nú eisini við Tórshavnar Kommunu um at skapa eitt íblásandi íverksetaraumhvørvi í Havn. Vit hava spurt Elina Heinesen, stjóra í SamViti, nakrar spurningar viðvíkjandi leiklutinum hjá SamViti í íverksetarahøpi**

SAMRØÐA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Íverksetarafundur í Klaksvík*

*Hvussu kann SamVit tryggja betri* vilkor fyri íverksetarar?

- SamVit hevur higartil arbeitt eftir Vinnupolitikkinum hjá fyrrverandi landsstýri, har SamVit hevur fingið til uppgávu at standa á odda fyri samskipanini av íverksetararáðgevingarvirksemi í Føroyum. Hetta inniber samskipan av arbeiðnum hjá íverksetarahúsunum kring landið. Uppgávan hjá SamViti í mun til íverksetan er serliga at lætta um møguleikarnar hjá íverksetarum at fáa atgongd til vitan, kapital og samstarvspartnarar og at tryggja, at tað ikki er ov tvørligt hjá íverksetarum at byrja sítt virksemi.

– Í SamViti starvast 18 fólk – harav 5 fólk starvast burturav á Menningardeildini, sum júst hevur til uppgávu bæði at ráðgeva fyritøkum, harímillum íverksetarum, og samskipa íverksetararáðgeving annars. Menningardeildin stendur fyri menningarverkætlanum – herundir ráðgeving av íverksetarum – serliga innan útflutnings-, ferða-, KT- og kreativu vinnurnar. Íverksetarahugtakið verður her hugsað breitt. Tvs. íverksetarar, sum ætla sær í gongd við virksemi, íverksetarar, sum er komnir í gongd og íverksetan, sum sprettir úr verandi virki (t.d. útflutningsprosjekt).

– Fólkini á menningardeildini í SamViti hava hvør sær serfrøði á ávísum økjum – tó serliga í mun til vakstrar- og útflutningsvirksemi. SamVit lýkur tí serligarráðgevingaruppgávur, sum snúgva seg mest um marknaðarføring, útflutningsvinnu og framtíðar virkisvøkstur, meðan SamVit samstarvar við onnur um aðra ráðgeving, sum snýr seg um tað meira grundleggjandi við at stovna fyritøkur heilt frá byrjan – t.d. við íverksetarahúsini, Vinnuhúsið og framyvir eisini við vinnuligu skúlarnar í Føroyum.

*Hví samskipa íverksetararáðgevingina?*

- SamVit ynskir at samskipa íverksetanarráðgevingina fyri at gera tað so yvirskoðiligt og lætt fyri íverksetaran sum gjørligt at leita sær ráð – líkamikið hvar viðkomandi býr, og hvørjum støði hann ella hon er á. Talan kann eisini vera um at menna nýggja íverksetan innan størri verandi fyritøkur. SamVit og Íverksetarahúsini kunnu samstarva og t.d. brúka ráðgevingarveitanir frá hvørjum øðrum, so íverksetarar harvið fáa atgongd til alla tøka serfrøði á marknaðinum, sum arbeiðir til gagns fyri íverksetarar. Um SamVit t.d. keypir íverksetararáðgeving frá serfrøði uttanfyri SamVit til tey, ið søkja sær ráð, ella letur ráðgeving frá serfrøðingum í SamViti til íverksetarahúsini, stuðlar SamVit harvið arbeiðnum hjá íverksetarahúsunum. Tó má hetta sjálvandi gerast við neyvum atliti til, at vit ikki taka breyð úr munninum á íverksetararáðgevum, sum liva av at veita ráðgeving, men at vit eisini samstarva við hesar serfrøðingar.

- Samstarv og samskipan er sjálvandi eisini neyðug fyri at tryggja, at arbeiðið hjá teim ymsu húsunum ikki umskarast, umframt at allar tøkar kreftir innan ymiska serfrøði verða lagdar saman og brúktar, hóast tær virka ymsastaðni í landinum. Um ráðgevingarserfrøðin í landinum verður samskipað, kemur best møguliga ráðgevingin at standa íverksetarunum í boði til eina og hvørja tíð.

### Gera portal

*Hvussu ætlar SamVit at samskipa íverksetararáðgevingina?*

- SamVit arbeiðir t.d. við eini ítøkiligari verkætlan um at stovna íverksetaraportal saman við íverksetarahúsunum, sum verður ein portalur fyri allar íverksetarar og íverksetararáðgevar. Vit ynskja at tryggja, at íverksetarahúsini ikki kappast innanhýsis – ella kappast móti privatum – men at øll stuðla uppundir hvørtannað til best møguligt gagn fyri íverksetararnar – og tað er eitt arbeiði, SamVit sum almennur stovnur beinleiðis undir Vinnumálaráðnum hevur fingið til uppgávu at standa á odda fyri.

- Harumframt arbeiðir SamVit við at stovna íverksetaranetverk fyri at skapa gjøgnumskygni íverksetarar og íverksetarahúsini ímillum. Íverksetarar kunnu læra av hvørjum øðrum og skapa nýggj hugskot saman. Íverksetaranetverkini skulu ikki bara vera lokal, men eisini altjóða, so føroyskir íverksetarar fáa samband við íverksetaranetverk uttanlands. Hetta er eitt stórt arbeiðsøki, sum SamVit fremur í løtuni saman við samstarvsfeløgum – t.d. saman við íverksetarahúsunum – men sum krevur mannorku og hóskandi upphæddir av fíggjarlógini fyri at kunna veruliggerast.

*Hvussu gongur við at gjøgnumføra ætlanirnar?*

- Um tað skal eydnast, er tað avgjørt neyðugt við eini hægri játtan, sum m.a. skal nýtast til at útbyggja samstarvið við íverksetararáðgevar og -hús umframt evt. komandi íverksetarahús og til at skapa netverk innan- og uttanlands. Vit arbeiða longu fyri, at íverksetarahúsini verða samskipað og kanska spesialiserað á ymsum økjum, so ráðgevingarkreftirnar verða brúktar so effektivt sum gjørligt, men vit mangla tøkan pening til at veruliggera t.d. portalin og ikki minst til kanska at kanalisera víðari til íverksetarahúsini, sum eisini mangla ressursur.

*Arbeiðir SamVit saman við íverksetarahúsum og -ráðgevum sum er?*

- Ja. Bitland er eitt íverksetarahús, vit samstarva tætt við. Bitland er ein góður samstarvsfelagi, sum t.d. hýsir Klekingardeplinum.